Todi:

# Eg fari ongan veg



*Todi Jónsson er sannførdur um, at hann framvegis kann vera við á hægsta støði*

**Føroyski FCK álopsspælarin vónar at fáa nógv burturúr síðstu mánaðunum í hesum sáttmálaskeiðnum,og hann og FCK hava avrátt at tosa saman seinni í vár**

ÚTISETI
*Jóannes Hansen*

Tað kemur ikki óvart á Toda Jónsson, tá ið hann hoyrir, at Politiken hevur skrivað, at hann er á veg til Herfølge. Onkrir danskir miðlar hava longu spurt seg fyri hjá Toda, um nú nakað er í hesum tíðindunum, og hann hevur givið teimum sama svarið, sum hann í eina tíð hevur havt á heimasíðuni, todi.fo.

– Eg eri sáttmálabundin í FCK inntil í summar, og eg fari ongan veg, áðrenn sáttmálaskeiðið er liðugt. Næstu mánaðirnir fara at vísa, hvussu tað verður við fótbóltsspælinum eftir summarfrítíðina.

*Men hevur tú fingið tilboð frá Herfølge at spæla við teimum nú beinanvegin?*

– Í FCK hava teir tann politikkin, at teir vanliga ikki gera viðmerkingar til tíðindi av sovornum slagi. Teir nýta formellu kanalirnar, tá ið teir keypa og selja spælarar, og tað vil siga, at tað fyrst verður boðað frá, har partabrøvini í FCK verða keypt og seld. Tí ber tað ikki til hjá mær at siga so nógv um sovorðin tíðindi, sigur Todi Jónsson.

*Men hevði tað ikki verið eitt gott hvøi hjá tær at fingið spælitíð og harvið at fingið staðfest, hvør dugur er í tær, um tú flutti eitt nú til Herfølge?*

– Sum sagt, so eri eg sinnaður at halda meg til sáttmálan við FCK. Eg kenni meg sannførdan um, at tað framvegis er møguleiki hjá mær at vera við á hægsta støði. Forðingin hevur verið skaðarnir, sum so ofta hava plágað. Vandin fyri teimum lúrir støðugt, og hann er eins stórur í eitt nú Herfølge, sum hann er í FCK.

Todi Jónsson sigur, at hann og FCK ikki enn hava tosað saman um møguleikarnar fyri framtíðar samstarvi. Teir hava avrátt at hittast um nakrar vikur.

– Eg havi fleiri ferðir sagt, at mær dámar sera væl í FCK, og at eg hevði einki havt ímóti at hildið fram í felagnum eftir summarfrítíðina. Men tað er eisini ein veruleiki, at fótbóltsaldurin er so mikið høgur, at møguleikarnir fyri at royna okkurt heilt annað, um tað so hevði verið í Danmark ella onkra aðra staðni, ikki fara at verða so nógvir í framtíðini. Tí eri eg opin fyri møguleikunum, sum møguliga fara at vísa seg. Men í fyrstu atløgu verði eg í FCK inntil í summar, staðfestir Todi Jónsson.

Og harvið kunnu vit staðfesta, at søgan í Politiken um, at Todi er á veg til Herfølge, ikki verður veruleiki. Ikki í hesum umfarinum í hvussu so er. Ivaleyst er tað nakað í tí, tá ið blaðið sigur, at Herfølge hevur áhuga í at knýta Toda afturat felagnum, og tað kann gott vera, at teir í FCK einki høvdu havt ímóti, at føroyski álopsspælarin hjá teimum flutti til Herfølge. Men sambært Toda sjálvum, so er hann sinnaður at stríðast fyri sessinum í FCK álopinum. Og um tað verður, sum tað plagar at vera, so fer hann at leggja alla orku í.


## Góðir brúktir bilar

| | |
|---|---|
| **Nissan Almera 1.4 Nordic Van** *sýnaður 9/2004*, reyður, árg 1999, 5 hurðar, km 52.000 **72.000,- v/MVG** | **Opel Vectra 2.0 DT** bláur, árg 1998, 4 hurðar, km. 133.000 **89.000,-** |
| **Peugeot 106 Diesel** bláur, árg 1995, 3 hurðar, km 92.000, fyrr kr. 45.900,- **nú 37.000,-** | **Opel Vectra 1.8 16V** ljósabláur, árg 1998, 4 hurðar, km. 106.000, fyrr kr. 97.000,- **nú 79.000,-** |
| **Peugeot Expert Van 2.0 Hdi** reyður, árg 2000, 4 hurðar, km 47.000 **119.000,- v/MVG** | **Opel Movano 2.5 Dti Van** hvítur, árg 2002, 4 hurðar, km 28.000 **215.000,- v/MVG** |
| **Opel Corsa 1.4 Swing** vínreyður, árg 1996, 5 hurðar, km 120.000 **39.900,-** | **Mazda E2200 lastbilur** reyður, árg 1996, 2 hurðar, km. 69.000, fyrr kr. 69.000 v/MVG **nú 49.000,- v/MVG** |
| **Opel Corsa 1.2** gráur, árg 2002, 3 hurðar, km 32.000 **90.000,-** | **Citroën C2 1.6 VTR SensoDrive** svartur, árg 2003, 3 hurðar, km. 13.000 **119.000,-** |
| **Opel Astra 1.6 Club** bláur, árg 1998, 5 hurðar, km 105.000, fyrr kr. 87.000,- **nú 75.000,-** | **Citroën Berlingo 1.4 Van** reyður, árg 2000, 4 hurðar, km 31.000 **86.000,- v/MVG** |
| **Opel Astra 1.6 Bensin** svartur, árg 2000, 5 hurðar, km 80.000, fyrr kr. 89.000,- **nú 69.000,-** | **Ford Focus 1.8 Diesel** gráur, árg 2001, 5 hurðar, km. 109.000 **109.000,-** |
| **Opel Astra 1.6** ljost bláur, árg 2001, 5 hurðar, km 68.000 **89.000,-** | **Ford Escort 1.8 Bensin** grønur, árg 1995, 4 hurðar, km. 104.000, fyrr kr. 49.000,- **nú 29.000,-** |
| **Opel Astra 2.0 Dti** bronze, árg 2000, 4 hurðar **115.000,-** | **Mazda 626 1.8 LX St.Car** *sýnaður 7/04*, reyður, árg 1999, 5 hurðar, km. 27.000 **116.000,- v/MVG** |
| **Opel Astra 1.7 DT** *nýsýn.*, grønur, árg 1999, 5 hurðar, km 104.000, fyrr kr. 105.000,- **nú 79.000,-** | **Opel Vectra 2.0 Dti Station Car** hvítur, árg 1999, 5 hurð., km. 85.000, fyrr kr. 125.000,- **nú 99.000,-** |

Gevið gætur: Bilarnir á listanum kunnu verða seldir
Fyrispurningar kunnu verða settir á telefon 34 54 00,
eisini ber til at senda teldupost til: nissan@nissan.fo
Bilarnir finnast eisini á: www.nissan.fo

Sosialurin 341800

P/F Meinhardt Arge
v/ Oyggjarvegin • Postsmoga 3171 • 110 Tórshavn • Tel. 31 61 61



KEYP SPORTSFELGUR...




...við dekkum á alnótini
WWW.NORMEK.FO
FO-512 NORÐRAGØTA · TEL 44 20 02 · FAX 44 20 22

Sosialurin 341800



Sosialurin
www.sosialurin.fo



**Argja Róðrarfelag**

*Gleðilig jól og eitt av Harranum signa nýggjár ynskja vit okkara rógvarum, róðrafeløgum, limum og stuðlum*

*Takk fyri eitt minningarríkt ár*

*Við róðrarkvøu*
***Nevndin***

Sosialurin



## Frá Føroya Shell

Skrivstovur okkara eru stongdar jólaaftan 24. desember og nýggjársaftan 31. desember.

Oljufýrstænastan hevur opið sum vanligt.

Viðskiftafólki okkara ynskja vit eini gleðilig jól og eitt eydnuríkt komandi ár, við tøkk fyri góða samvinnu í skjótt farna ári.

Shell



## Umboðsmannaval

Sambært grein 28 í høvuðssamtyktini verður lýst til umboðsmannaval mikudagin 16. februar 2005 í Vestmanna og Kollafjarðar umdømi.

Uppskot til umboð – minst tvey fyri hvørt umdømi – skulu skrivliga vera sjúkrakassanum í hendi í seinasta lagi 2. februar 2005.

**Sjúkrakassi Vestmanna Læknadømis**
á Miðgerði 19, 410 Kollafjørður



## GSM telefonir

Nokia - Siemens - Motorola
Ericsson - Panasonic

## Tráðleysar

Siemens Dect.
Kunnu ikki avlurtast

## Til skip og bátar

NMT 450 - VHF telefonir v.m.

Storno
SØLA & TÆNASTA
Handan Á 6 - 100 Tórshavn
Tel. 314414 - Fax 318045